# Handilslærlingur

Vit sóknast eftir lærlingi til VHS deildina hjá P/F Mariu Poulsen, Smyrilsvegur 8.

Vit kunnu bjóða eitt spennandi yrki, við dagligum avbjóðingum og góðum arbeiðsumhvørvi.

FHS ella HH er ein treyt fyri at byrja sum lærlingur í handilsvinnuni.

Vit vænta at tú ert røsk/raskur, fyrikomandi og von/vanur við at fáast við fólk. Harafturat er tað ein fyrimunur um tú hevur aðrar royndir ella útbúgvingar innan handilsvinnuna, men hetta er ikki ein treyt.

Seinasta freist at senda inn umsókn við prógvum er, fríggjadagin 10. juni 2005.

Eru spurningar eru tygum altíð vælkomin at ringja tlf. 312000.

**pf Maria Poulsen & Co.**

Box 182
FO-110 Tórshavn

# Maskinmeistarar við føroyskum fiskiskipum

Fundur verður fyri limir, ið sigla við føroyskum fiskiskipum

**Mánadagin 23. mai kl. 12.00**

í fundarhøli felagsins á Grønlandsvegi 58.

Til viðgerðar verða sáttmálaviðurskiftir innan allar veiðihættir.

MASKINMEISTARAFELAGIÐ

# Eiðis skúli

Søkt verður eftir lærarum til Eiðis skúla.

- 1 tíðaravmarkað starv skúlárið 2005/2006 fyri lærara í farloyvi. Starvið er fulltíðarstarv
- 1 tíðaravmarkað starv skúlaárið 2005/2006 vegna avlopstímar. Starvið er o.u. 20 tímar um vikuna
- 1 stuðulsfólk 25 tímar um vikuna

Lærarastørvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkinum 18.1 - .27.4.

Stuðulsstarvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Meira kann fáast at vita um størvini frá fyrstalæraranum á tlf. 423579 ella 229045.

Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu vera Skúlastýrinum í hendi í seinasta lagið 6. juni 2005.

**Skúlastýrið**
v/Annika Egholm
470 Eiði

*Eiðis skúli hevur undirvísing í 1.-7. árgangi. Skúlin er bygdur út við serstovum, lærarahølum og ítróttarhøll og hevur góðar umstøður til næmingar og lærarar. Komandi skúlaár verða 8 lærarar og 75 næmingar í Eiðis skúla*

# Handilslærlingur

**Til Toystovuna á Tvøroyri**

Søkt verður eftir røskum fyrikomandi lærlingi, ið er áhugaður at arbeiða við klæðnamóta.

Ein treyt er, at tú hevur FHS ella HH.

Er hetta nakað fyri teg, so send eina skrivliga umsókn til okkara innan 1. juni.

**Toystovan**
FO-800 Tvøroyri
att.: Désirée Mortensen Potts

# Søkt verður eftir sølufólki/innkeypara

*Havsbrún er eitt av størstu og tøkniliga mest framkomnu framleiðsluvirkjunum í Føroyum við 90 starvsfólkum og einum umsetningi uppá uml. 500 mill. kr árliga. Havsbrún framleiðir fiskamjøl og lýsi á Mjøldeildini, og alifóður á Fóðurdeildini. Størsti parturin av framleiðsluni fer til útflutnings.*

Vit søkja eftir einum fólki til sølu av fiskafóðuri og at samskipa innkeyp av rávørum v.m. Vit kunnu bjóða eitt spennandi arbeiði í einum dynamiskum umhvørvi, har menningin gongur við rúkandi ferð.

**Arbeiðsuppgávur:**
- taka lut í søluarbeiðinum av fóðuri
- kundasamskifti
- innkeyp av rávørum til fóðurframleiðsluna
- leggja tilrættis flutning av innkeyptum rávørum og seldum fóðurvørum
- taka lut í fyrisitingarligum uppgávum

**Vit rokna við at tú hevur:**
- eina góða, relevanta útbúgving
- hollan málsligan kunnleika í føroyskum, enskum og skandinaviskum málum
- kunnleika til teldur
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni

Umsøkjarar við hollari, lívfrøðiligari vitan hava fyrimun. Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 13. juni 2005. Vil tú vita meiri, ert tú vælkomin at ringja til okkum ella senda teldupost.

HAVSBRÚN

**pf Havsbrún**
FO-530 Fuglafjørður
Tlf. 414400 · Fax 414401
Mail: ode@havsbrun.fo

Gøtu Kommuna

# Lærarastørv í Gøtu skúla

**Við Gøtu skúla eru hesi størv leys at søkja í skúlaárinum 2005/2006:**

Vegna farloyvi verður søkt eftir 2 lærarum í tíðaravmarkað størv fyri skúlaárið 2005/2006. Størvini eru fulltíðarstørv.

Vegna tímar til serundurvísing verður søkt eftir 1 lærara í tíðaravmarkað starv fyri skúlaárið 2005/2006. Starvið er fulltíðarstarv.

Størvini verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 - 27.4.

Umsóknirnar skulu verða formanninum í skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 2. juni kl. 16.00.

Um nærri upplýsingar ber til at venda sær til skúlaleiðaran á tlf. 441059 ella 210959.

**Gøtu Skúlastýri**
v/ Páll Jacobsen, form.
FO-513 Syðrugøtu
Tlf. 441536 ella 217333

# Stuðul til uppihaldspening

Umsókn um stuðul til uppihaldspening fyri fyrra hálvár 2005 saman við kvittanum fyri goldnan barnapening, skal vera Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 03.06.2005. Um goldið verður til Toll- og Skattstovu Føroya, er ikki neyðugt at lata inn kvittanir.

Umsóknir sum vera Almannastovuni í hendi innan nevndu freist verður væntandi avgreiddar í juni 2005.

Umsóknarbløð fáast við at venda sær til økisdeildirnar. Verður søkt fyrstu ferð, skal avrit av gjaldsavgerð um barnagjald/-gjøld frá Ríkisumboðnum, ella samsvarandi útlendsk gjaldsavgerð sendast inn saman við umsóknini.

**Almannastovan**

**Økisdeildin í Tórshavn**
J. Broncksgøta 27
100 Tórshavn
Tlf. 35 35 70 - fax 35 35 71

**Økisdeildin í Eysturoy**
Heiðavegur
620 Runavík
Tlf. 47 47 10 - fax 47 47 11

**Økisdeildin í Norðoyggjum**
Klaksvíksvegur 78A
700 Klaksvík
Tlf. 45 72 40 - fax 45 72 41

**Økisdeildin í Suðuroy**
800 Tvøroyri
Tlf. 35 35 60 - fax 35 35 61